Landsroyndir

Umráðandi at venja til: “At lesa og skilja tekst”

Lesið hvønn dag í minst 20 min. frá nú av og til royndin verður. Tað ber ikki til at innheinta allar tímarnar, ein kundi havt lisið tey seinastu árini, men tað ger mun at lesa hvønn dag 3 tær næstu vikurnar, áðrenn royndin verður - tvs eisini í páskafrítíðini.

Umráðandi at venja til: “Fyrisøgn”

Venjið tykkum at skriva á teldu. Nøkur hava trupult við at skriva við stórum bókstavi, at skriva á, í, ó og ý, umframt at finna ð, æ og ø. Tit kunnu t.d. venja við at skriva eitt brot úr onkrari bók. Venjið tykkum somuleiðis at nýta www.sprotin.fo at finna útav, hvussu orð verða stavað og bend.

Orð at venja:

Eg *havi* veri**ð** í skúla.

Tey høvdu fingi**ð** frí.

Tað dámar mær vel.

Elsa,ið (sum) var fimm ár, var ógvuliga móð.

aðra, aðrar	annaðhvørt	bláur	eingin (ella ongin)
aðrastaðni	ábyrgd	búgva (búði)	Evropa
aftan	áðni (í áðni)	býur	eystur
aftarlaga	áðrenn	bøur, bøin	fá, fáur
aftastur	bæði	duga, dugdi	fáa
altíð	beiggi	dupultur	fegin
annað	biðja (hann biður)	døgurði	

fegin	fróur (glaður)
fer (hann fer út - sagnorð)	Føroyar, í Føroyum, føroyingar, føroyskt.
ferð (ein ferð/hann hevði onga ferð - navnorð)	ger (hann ger skúlating – sagnorð)
fram	gerð (ein ljót gerð – navnorð)

geva, góvu
gjár
hevði
hevur havt
hill
leingist
legði
liðugur, liðugt
liggja, lógu
læra, lærdi
meðan
mikið
morgun
nakað
nakrar
onkuntíð
ongantíð
oyggj, oynni
segði
seinni
sigla, sigldi
síðsti
sóu (at síggja)
skjót (hon er skjót)
skjótt (hon rennur skjótt)
spæla
stuttligt
tá ið
tíðliga (tíðliga um morgunin)
traðka
týðiliga (hon tosar týðiliga)
triði (triði flokkur)
triðja (í triðja flokki)
tyngri (tungur/tyngri/tyngstur)
var

varð (tá ið tað merkir *bleiv – Veitslan varð hildin í skúlanum.*)

vegur (sum vit koyra á)
veður (nú er gott veður – veðrið er gott)
vitja
yngri (ung/yngri/yngst)
ynskja, ynski, hevði ynskt
ymiskt
øðrvísi
øðrum

<u>Umráðandi at venja til: "Mállæra" (og "Fyrisøgn")</u>

Stavraðið: a á b d ð e f g h i í j k l m n o ó p r s t u ú v y ý æ ø ei ey oy

Orðaflokkarnir: Navnorð, sagnorð, lýsingarorð, talorð, fornøvn og miðalvarpingar

<u>Navnorð</u>: Navnorð eru orð, har vit kunnu seta ein, eitt ella fleiri framman fyri. Vit kunnu ofta síggja, hoyra, føla, lukta ella smakka orð, ið eru navnorð.

Ein *genta*, ein *súkkla*, ein *bók*, eitt *barn*, eitt *borð*, eitt *hús*, fleiri *gentur*, fleiri *bøkur*, osfr.

Eintal/fleirtal og óbundið/bundið

eintal - óbundið (ein/eitt)	eintal - bundið (hin/hitt)	fleirtal - óbundið (fleiri)	Fleirtal - bundið (hinir/hinar/hini)
dukka	dukkan	dukkur	dukkurnar
bussur	bussurin	bussar	bussarnir
eyga	eygað	eygu	eyguni

(Kvennkynsorð, ið enda við –a í eintali, enda við –ur í fleirtali. Dømi: dukka – dukkur) (Um navnorð endar við –r í fleirtali, óbundið, verður tað (-r) verandi í fleirtali, bundið. Dømi: fleiri flokka**r** = flokka**r**nir fleiri kannu**r** - kannu**r**nar fleiri hosu**r** - hosu**r**nar)

Føllini

Vit benda eisini navnorð í føllum. Vit hava fýra føll: Hvørfall, hvønnfall, hvørjumfall og hvørsfall. Tá ið vit vilja vita, hvussu orðini eita í teimum ymisku føllunum, spyrja við:
Hvørfall: “Hvør er har?” (ein bátur, fleiri bátar)
Hvønnfall: “Hvønn sást tú?” (ein bát, fleiri bátar)
Hvørjumfall: “Hvørjum vart tú saman við?” (einum báti, fleiri bátum)
Hvørsfall: “Hvørs vegna?” (báts, báta)

Kallkyn (hann), kvennkyn (hon) og hvørkikyn (tað)

Hvat kyn er orðið "bátur"? Vit spyrja: "Hvar er báturin?" Svarið sigur okkum kynið: **Hann** er...."

Hvat kyn er orðið "dukka"? Vit spyrja: "Hvar er dukkan?" Svarið sigur okkum kynið: "**Hon** er...."

Hvat kyn er orðið "træ"? Vit spyrja: "Hvar er træið?" Svarið sigur okkum kynið: "**Tað** er...."

Nær enda navnorð við ð? Tá ið talan er um bundið hvørkikynsorð í eintali. Ein góður regul: Um navnorðið endar við sjálvljóði, og tú kanst seta ***bátin*** ella ***báturin*** inn fyri tað, endar tað við ð.

Dømi:
*Hon setti seg við **borðið**.* (*Hon setti seg við **“bátin”**.* – Tað vil siga, at tað endar við ð.)
*Tað lá á einum **borði**.* (*Tað lá á einum **“báti”**.* – Tað vil siga einki ð.)
*Hvar er **lambið**?* (*Hvar er **“báturin”**?* – Tað vil siga, at tað endar við ð.)
*Eg møtti einum fittum **lambi**.* (*Eg møtti einum fittum **“báti”**.* – Tað vil siga einki ð.)

<u>Sagnorð</u>: Sagnorð eru orð, ið siga frá eini hending ella eini rørslu. Vit kunnu seta at, eg, tú, hann/hon/tað, vit, tit, tær/teir/tey og nøvn framman fyri eitt sagnorð.

at *renna* - eg *renni* - tú *rennur* - hon *rennur* - vit *renna* - Elsa *rennur* - Rói *rennur* - osfr.

at *vera* - eg *eri* - tú *ert* - tað *er* - tær *eru* - Sára *er* - Per *er* - osfr.

At benda sagnorð: Eintal/fleirtal, ymiskar tíðir

Navnháttur	**Nútíð (eintal)**	**Tátíð (eintal)**	**Tátíð (fleirtal)**	**Tátíðar lýsingarháttur (eintal)**
at drekka	hann/hon/tað drekk<u>ur</u>	hann/hon/tað drakk	teir/tær/tey drukk<u>u</u>	hann/hon/tað hevur drukk<u>ið</u>
Goyma	goym<u>ir</u>	goymd<u>i</u>	goymd<u>u</u>	goymt
Skriva	skriv<u>ar</u>	skrivað<u>i</u>	skrivað<u>u</u>	skriv<u>að</u>

Nær enda sagnorð við –ir og nær við –ur í nútíð, eintali? Um fyrsta sjálvljóðið broytist frá navnhátti til tátíð endar sagnorðið við –ur í nútíð.

Dømi: at s**<u>y</u>**ngja – hann s**<u>a</u>**ng = syng**<u>ur</u>** at r**<u>e</u>**nna – hann r**<u>a</u>**nn = renn**<u>ur</u>** at s**<u>i</u>**ga – hann s**<u>e</u>**gði = sig**<u>ur</u>**

Sterkt bend og veikt bend sagnorð

Tá ið sagnorðið bert hevur eitt klapp í tátíð, er sagnorðið sterkt bent. (Dømi: svav, rann, leyp)
Tá ið sagnorðið hevur tvey ella fleiri klapp í tátíð, er sagnorðið veikt bent. (Dømi: dugdi, hjálpti, segði, skrivaði)

Nær enda sagnorð við – ð?

Tá ið tey standa í lýsingarhátti í tátíð og enda við sjálvljóði. Ein góður regul: Um tú kanst seta ***dømd*** ella ***dømt*** inn fyri sagnorðið, endar tað við –ð (eftir sjálvljóðið).

Dømi:
*Vit hava **fingið** frí.* (*Vit hava **'dømt'** frí.* – Tað vil siga, at tað endar við ð)
*Eg havi ofta **svomið** í Klaksvík.* (*Eg havi ofta **'dømt'** í Klaksvík.* – Tað vil siga, at tað endar við ð)

*Bókin er **skrivað**.* (*Bókin er **'dømd'**.* – Tað vil siga, at tað endar við ð)
*Pól fekk **skorið** reipið sundur. (Pól fekk **'dømt'** reipið sundur. – Tað vil siga, at tað endar við ð)*

<u>Lýsingarorð</u>: Lýsingarorð eru orð, ið siga okkum, hvussu eitt navnorð (eitt ting, ein persónur, eitt djór ella annað) er ella hvussu tað sær út.

Gentan er ***fitt***.

Silas var ***raskastur***.

Eg sá eina ***gamla*** konu í bussinum í dag.

Anna var í einum ***vøkrum*** kjóla í gjár.

At stigbenda lýsingarorð: grundstig - miðstig - hástig

Kallkyn: Markus er *skjótur (grundstig)* - Dánjal er *skjótari* (miðstig) - Sofus er *skjótastur (hástig)*

Kvennkyn: Elsa er *røsk (grundstig)* - Sára er *raskari* (miðstig) - Bjørt er *raskast (hástig)*

Hvørkikyn: Borðið er *stórt (grundstig)* - kamarið er *størri* (miðstig) - húsið er *størst (hástig)*

<u>Talorð</u>

Grundtøl: (kallkyn) ein, tveir, tríggir... (kvennkyn) ein, tvær, tríggjar... (hvørkikyn) eitt, tvey, trý....

Raðtøl: (kallkyn) fyrsti, annar, triði... (kvennkyn) fyrsta, onnur, triðja... (hvørkikyn) fyrsta, annað, triðja...

Skiftitøl: (kallkyn) einir, tvinnir, trinnir... (kvennkyn) einar, tvinnar, trinnar... (hvørkiky) eini, tvinni, trinni...

<u>Fornøvn</u>

Fornøvn eru orð, ið verða sett í staðin fyri serliga navnorð, so at ikki verður neyðugt at siga navnorðið fleiri ferðir upp í saman.

Persónsfornøvn: *eg, tú, hann, hon, tað, vit, tit og tey*
Persónsfornøvn verða bend í øllum føllum, tey broytast tá t.d. til: *meg, mær, honum, teirra, tykkum*, osfr.

Afturbent fornavn: *seg – sær – sín*
Afturbent fornavn vísir aftur til tann, ið tosað verður um. (Dømi: *Hann legði **seg**. Hon gav **sær** góða tíð. Hon bað hann koma til **sín**.*)

Ognarfornøvn: *mín, tín, sín, hansara, hennara, tess, okkara, tykkara* og *teirra.*

Miðalvarpingar

Miðalvarpingar eru smáorð ella ljóð, ið vit nýta at vísa kenslur ella hvørjum hýri, vit eru í. Dømi: *ádú, hó, hey, takk* og so framvegis.
Eisini orð, ið vit nýta, tá ið vit rópa á kríatúr ella herma eftir dýrum, eru miðalvarpingar. Dømi: *gvagg, mjavv, klipp, hússj* og so framvegis.

At greina setningar

Umsøgnin er sagnorðið í setninginum (sagnorð í navnhátti, t.d. *at gera*, er tó ikki umsøgn).

Rannvá hoppaði band. (*hoppaði* er umsøgn.)
Silja og Rúni hava runnið um kapp. (*hava runnið* er samansett umsøgn.)

Grundliðurin er tann, ið fremir umsøgnina.

Rannvá hoppaði band. (Hvør *hoppaði*? Rannvá. *Rannvá* er grundliður)
Silja og Rúni hava runnið um kapp. (Hvør *hevur runnið*? Silja og Rúni. *Silja* og *Rúni* eru grundliðir)

Ávirki í hvønnfalli
Greta át breyðið. (*át* er umsøgn. Hvør *át*? Greta. *Greta* er grundliður. Hvat át Greta? Breyðið. Tá ið vit spyrja hvat ella hvønn, er talan um ávirki í hvønnfalli. Tað vil siga, at *"breyðið", er ávirki í hvønnfalli.*

Ávirki í hvørjumfalli
Mamman gav kettuni mjólk. (*gav* er umsøgn. Hvør gav? Mamman. *Mamman* er grundliður. Hvat gav mamman? Mjólk. *Mjólk* er ávirki í hvønnfalli. Hvørjum gav mamman mjólk? Kettuni. Tá ið vit spyrja hvørjum, er talan um ávirki í hvørjumfalli. Tað vil siga, at "*kettuni"* er ávirki í hvørjumfalli.